# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Systkinabørn í Smiðjuni



*Systkinabørnini Sólvá Jensen og Jón Magnus Joensen hava í hesum døgum eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin 30. september frá kl. 16 – 19 læt upp ein málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík hjá systkinabørnunum Sólvá Jensen og Jón Magnus Joensen á Argjum.

Hetta er fjórðu ferð, at Jón Magnus sýnir fram í Smiðjuni, meðan tað er fyrstu ferð hjá Sólvá, sum eisini var við á ólavsøkuframsýningini í ár.

Jóan Magnus sýnir fram oljumálningar, og myndaevnini eru náttúran, meðan Sólvá hevur akrylmálningar við fólki og fuglum. Henni hevur altíð dámt væl at tekna.

Jóan Magnus hevur málað í nógv ár, og hevur hann t.d. verið á listaháskúla í Holbæk í Danmark. Hetta er fyrstu ferð, at tey hava eina framsýning saman.

Framsýningin er opin til og við týsdagin 4. oktober. Leygardagin frá 10-19, sunnudagin frá kl. 15.30-19, og mánadagin og týsdagin frá kl. 15-19.

### 50 ára føðingardagur

Sunnudagin 2. oktober fyllir Símun Joensen, Saltangará, 50 ár. Føðingardagurin verður hildin í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 65 ára føðingardagur

Sunnudagin 2. oktober fyllir Jóhanna Hansen, Landavegur 13, Tórshavn, 65 ár. Opið hús verður heima á Landavegnum frá kl. 13.00 sunnudagin.

### 70 ára føðingardagur

Sunnudagin 2. oktober fyllir Frede Benjaminsen, Nes, 70 ár. Vælkomst verður á Svangaskarði leygarkvøldið 1. oktober kl. 19.00.

### 75 ára føðingardagar

Í dag, 1. oktober fyllir Alex Sólstein, fyrrv. skúlastjóri, Klaksvík 75 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

Mánadagin 3. oktober verður Jens Petur Johansen av Argjum 75 ár. Dagurin verður hildin leygarkvøldið 1. oktober í Reynsgøtu 11 á Argjum hjá Ingemar.

### 80 ára føðingdagur

Týsdagin 4. oktober fyllir Thomas Juul við Skipá 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 04.10. hava Ann- Mary og Klaus Rasmussen Tórshavn, silvurbrúðleyp.

### Brúdleyp

Í dag, 1. oktober kl. 15.00 giftast í býráðssalinum í Klaksvík Tina Petersen, Norðdepli og Jóhan Isaksen, Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Norð fyri innbodnum.

Í dag, 1. oktober kl. 16.00 giftast í Vágs kirkju Johild Poulsen, Hvalba og Sonni Mørk, Vágur. Veitslan verður í Roynhøllini kl. 19.00 fyri innbodnum.

### Prógv

Hósdagin 29. september 2005 tók Sámal Matras Kristiansen úr Fuglafirði kandidatprógv (cand.scient. soc.) í samfelagsfrøði og geografi á Roskilde Universitetscenter við høvuðsritgerðini »Forestillingen om bostedet - et casestudie af bosætningen i det færøske hovedland i en mobil tidsalder«.

Bárður Tuftum Petersen er, tann 26. august, útbúgvin civilverkfrøðingur (civilingeniør, cand. polyt) frá Danmarks Tekniske Universitet (DTU) innan greinina bygging.

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Amanda Lamhauge,**
**Lamba**

doyði og varð jarðað.

Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og tónleikarar.
Tøkk fyri blómur og kransar til jarðarferðina og fyri gávur til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Ellisheiminum fyri umsorgan og røkt ta tíðina, hon búði har.

**Børnini við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Sidonius Joensen**
**Skála**

doyði og varð jarðaður.

Takk fyri blómur, kransar og gávur til eldrasambýlið og tøkk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Ein serlig tøkk til starvsfólkið á sambýlinum á Skála, fyri tíðina ið hann var har.

*Familjunnar vegna*
**Jólsvein, Fríðbjørg, Elmar og Eyðbjørn**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum samkenslu, tá kæra kona, mamma, omma og vermamma okkara

**Maud Heinesen**
**f. Brimheim**

andaðist og varð jarðað.

Fyrst og fremst hjartans tøkk til øll, sum vóru um Maud heima og á B7/B6 á Landssjúkrahúsinum síðstu tíð hennara.
Ein stór tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt rættu okkum eina hjálpandi hond við ervinum og í tíðini áðrenn og eftir, Maud andaðist.
Tøkk fyri blómur, kransar, brøv, telefonuppringingar, heilsanir og troystandi orð.
Tøkk til øll, sum hava latið Amnesty International, Føroya Deild, eina gávu til minnis um Maud og arbeiði hennara fyri felagsskapin.
Tøkk til tann stóra skarða, sum fylgdi Maud til hennara seinasta hvíldarstað og til øll, sum vitjaðu okkum eftir jarðarferðina.
Tøkk til Hera Joensen, prest, kirkjutænarar, sangarar, tónleikarar og gravarar.
Ein serlig tøkk til Didduna, sum kom heilt úr USA at vera um systir sína fleiri mánaðir í summar.

*Familjunnar vegna*
**Jens Pauli, Marianna og Elin við familjum**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæra kona mín og mamma okkara

**Elspa Jegind**
**fødd Høgnesen,**
**ættað úr Leirvík**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina og ervið og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Keld, Marie og Niels**